Løgmaður við tingformannin:

Flyt fíggjarlóg til frama fyri fletting

Viðgerðin av fíggjarlógini átti at verið flutt soleiðis, at hon ikki er samtíðis, sum menn eru á fjalli og fletta. Hetta eru ein týðandi partur av okkara gerandismentan, sum tíanverri er við at hvørva, og tað harmar meg sigur løgmaður, sum sjálvur raðfestir tað at fara á fjall og at fletta sera høgt.

FÍGGJARLÓG OG LØGMAÐUR
Jan Müller

Løgmaður heldur tað er sera óheppið at viðgerðin av fíggjarlógini er samstundis sum menn eru á fjalli og flettingin er byrjað

Undir fíggjarlógarviðgerðini fýltust fleiri tingmenn á, at løgmaður ikki varð til steðar undir allari viðgerðini. Vit hava spurt Anfinn Kallsberg, løgmann, hvat hann sigur til hesar atfinningar, og hví hann ikki er í tinginum, tá ein so grundleggjandi og týðandi lóggáva er til viðgerðar.

– Eg havi tað soleiðis, at tað eru nøkur ting eg raðfesti sera høgt. Tað geri eg eisini við eini fíggjarlógarviðgerð og var hóast alt allan tann fyrsta dagin við. Tá hevði eg serliga áhuga fyri tí framsøgumenninir søgdu. Og eftir tað vóru tað kanska serliga teir einstøku landsstýrismenninir, sum skuldu vera við í viðgerðini. Eg havi nøkur málsøki og royndi í mínum innleggi at greiða frá teimum, so tingmenn vistu, hvat tað snúði seg.

Løgmaður kennir annars henda kritikkin aftur. Tað eru altíð nakrir tingmenn , sum ikki fara á tingsins røðarapall uttan at hyggja eftir, hvørjir landsstýrismenn ikki eru við og so varpa út fyri øllum Føroya fólki, hvørjir ikki eru har.

Hann viðgongur tó, at sjálvandi skal løgmaður royna at vera mest møguligt í tinginum, men hann kann ikki vera allastaðni.

Hóast mong kanska ikki hugsa um fjallgongu og fletting, sum ein part av okkara mentan, so leggur løgmaður sera stóran dent á júst henda partin av okkara mentan. – Eg skal viðganga, at eg eri ikki nógv við, har tað hevur við mentan at gera, men ta mentan, sum hevur við fjallgongu og fletting at gera, er nakað sum eg raðfesti ógvuliga høgt.

– Men kann tað ikki skurra løgið í oyrunum á fólki, at løgmaður raðfestir tað at fara á fjall og fletta hægri enn landsins fíggjarlóg?

– Viðgerðin av fíggjarlógini fyri mítt viðkomandi er liðug, tá málið verður lagt fyri tingið. Tað, sum gongur fyri seg í tinginum er ein viðgerð av einum fíggjarlógaruppskoti, har man kemur við nøkrum útspælum ikki yvirfyri landsstýrinum men yvirfyri tí nevndini, sum skal arbeiða viðari við málinum.

Løgmaður vísir á, at hyggur man at danskari fíggjarlógarviðgerð, so er tað ikki ein spurningur til ráðharrarnar men til ta nevndina ella tann og tann framsøgumannin. Fíggjarlógarviðgerðin er fyrst og fremst fyri tingmenninar. - Sjálvandi skulu vit vera við og svara spurningum í tann mun hetta er gjørligt.

Løgmaður heldur tað annars hevði verið sera skilagott, um tingformaðurin flutti viðgerðina av fíggjarlógini soleiðis at hon ikki fall saman við fjallgongu og fletting. Tað er tingformaðurin, sum suverent avger tað. At hann nú eisini er farin at leggja tingfundir í heystfrítíðini hjá skúlanæmingum heldur løgmaður eisini vera løgið. Tað heldur enn ikki er hent áður.

– Men hevur tú ikki eitt forkláringsproblem, um tingmenn fegnir vilja hava samband við teg í viðgerðini, og tú als ikki er til steðar?

– Tað kann mans siga. Men tingmenninir vilja í veruleikanum als ikki í samband við meg. Teir flestu hava eina skrivaða talu.

Løgmaður vísir á, at teir flestu av teimum eldru tingmonnunum høvdu prioreiterað júst sum hann, tá talan er um fjallgongu og fletting. – Tað sær ikki mætari út enn, at tað er komin ein nýggj tíð og man má nokk innsíggja, at tann gamla føroyska gerandismentanin er við at hvørva, og tað harmar meg øgiligt.

Hugtiknir íslendingar

Hanus, Kári, Eivør. Hetta eru nøkur av tónleikanøvnunum, sum av álvara gera vart við seg í Íslandi í hesum døgum. Eftir fyrstu konsertina, sum er liður í konsertferð í hesum døgum, eru íslendingar einki minni enn púra bergtiknir

TÓNLEIKUR
Dagfinn olsen

Fleiri føroyskir tónleikarar eru á konsertferð í Íslandi í hesum døgum undir heitinum Fairwaves, ella tiltikna føroyska bylgjan.

Fleiri íslendingar, vit hava samband við, hava latið frætt frá sær, nú fyrstu konsertirnar hava verið. Sum skilst, so var fyrsta konsertin við Eivør Pálsdóttir, Hanus G. Johansen og Kára Sverrisson sera væl eydnað. Ingólfur Juliusson er ein, ið fylgir væl við føroysku byrgjuni og hann var til staðar, tá hesi í vikuni framførdu.

Gandakallurin Hanus

Hann sigur, at konsertin var framúr og fagnaðurin fekk ongan enda. Kári ,og Mikael Blak á bassi, byrjaðu konsertina og løgdu botn í og skaptu gott huglag. Síðani kom Hanus og bertók øll, eisini tá hann sang íslendska lagið Fatlafól, ið mett verður, at hann sang betri, enn upprunalagið. Ein framførsla við orku og hann verður samanborin við ein gandakall á palli.

Eivør kom á pall við íslendskari manning, ið hevði gjørt sítt heimaarbeiði. Lag eftir lag hugtók hon fjøldina.

Føroyska bylgjan hevur ikki lagt seg í Íslandi, heldur hinvegin!



Hanus G. Johansen er á ferð í Íslandi, eins og aðrir føroyskir tónleikarar. Hann hugtók í vikuni íslendsku fjøldina, eisini tá hann sang íslendskan tónleik

Stóra seyðasølan verður í Runavík dag

Í kvøld og í nátt verður eisini høvi hjá fólki at fáa sær ein "swing-om" í Runavík; tá fara vælumtókta, Anita úr Noregi og faðir hennara, at syngja og spæla countrytónleik

TILTØK
Vilmund Jacobsen

Í dag verður so stóra seyðauppboðssølan, sum Kappróðrarfelagið NSÍ skipar fyri í ítróttarhøllini í Runavík.

Sølan byrjar kl. 14, og á staðnum verða royndir menn, sum fara at meta um seyðin og geva fólki hollan stuðul, tá ið bjóðast skal.

Millum seyðirnar, sum seldir verða á uppboði, er ein góður veðrur, sum verður seldur á meksikanskan hátt, sum tað verður rópt. Í hesum førinum verða 50 kr. goldnar fyri hvørt boðið, ið givið verður.

Stigtakararnir siga, at høvið verður eisini hjá fólki at bjóða uppá ræstan fisk og onkra kalvaspraggu av og á.

Grill, køkutombola og countrydansur

Í ítróttarhøllini verður eisini stórt køkutombola, sum byrjar kl. 14.

- Og grillin verður tendrað allan dagin. Tí, hvat er ein góður dagur í ítróttarhøllini uttan eina vælstokta pylsu - og kanska verður eisini ein stoktur búffur at fáa, siga stigtakararnir.

Í kvøld verður eisini høvi hjá fólki at fáa sær ein "swing-om" í Runavík.

Frá kl. 23.00-04.00 verður góður countrydansur við vælumtóktu norsku sangarinnuni, Anitu. Hon fer at syngja og spæla saman við faðiri sínum.

Kappróðrarfelagið NSÍ sigur, at Anita hevur eina fjøltáttaða skrá við góðum dansitónleiki.

Handilin, Opus í Saltangará, hevur stuðlað tiltakinum hjá Kappróðrarfelagnum.

Í dag verður stór seyðasøla í ítróttarhøllini í Runavík, har eitt nú ein veðrur verður seldur á meksikanskan hátt. Í kvøld verður countrydansur við norsku Anitu, sum er vælumtókt á Bergen-leiðini.

Mynd: Vilmund Jacobsen

Í dag hava vit opið frá kl. 11.00-15.00

Í hesum sambandi hava vit nógv góð brúktbilatilboð m.a. hesi

Mitsubishi L300 2,5D km. 161.000, árg. juni 1994 70.000,- LEYGARDAGIN 50.000,-	Jeep Cherokee 2,5TD km. 80.000, árg. juli 1997 135.000,- LEYGARDAGIN 120.000,-	Seat Cordoba 1,9SDI STC. 5H km. 39.000, árg. aug. 1999 125.000,- LEYGARDAGIN 85.000,-
Suzuki Baleno 1,3l 4h km. 27.500, árg. apr. 2000 108.000,- LEYGARDAGIN 91.000,-	Citroen ZX 1,9TD 5H km. 160.000, árg. 1997 89.000,- LEYGARDAGIN 80.000,-	Citroen Jumper 2,5TD LH km. 120.000, árg. aug. 1996 120.000,- LEYGARDAGIN 105.000,-
Citroen Xantia 1,9D km. 120.000, árg. aug. 1997 106.000,- LEYGARDAGIN 95.000,-	Peugeto 306 D 4H km. 150.000, árg. apr. 1995 60.000,- LEYGARDAGIN 52.000,-	Mitsubishi Galant 1,8GLSI km. 167.000, árg. 1992 35.000,- LEYGARDAGIN 32.000,-

Møguleiki er eisini fyri at royna nýggjar bilar

Vælkomin til

Vit hava fleiri aðrar bilar á goymslu

CITROËN Mercedes-Benz

Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo